**Magnus Heinason – Túrfrágreiðing**
**Túrur nr. 2011 Brislingur, tíðarskeið 25-29/3 2020**

**Fólk frá HAV:** Jan Arge Jacobsen, Leon Smith, Poul Vestergaard, Hannipoula Olsen og Eydna í Homrum

**Ábyrgd:** Jan Arge Jacobsen

**Endamál:** Hesin túrur er ætlaður at kanna hvar brislingurin er tíðliga um várið, eftir at fiskiskapurin er liðugur, og at kanna búningina hjá brislinginum hesa tíðina. Skálafjørðurin og Tangafjørður vóru raðfest øki. Hetta var ein uppfylgjandi undankanning, sum er liður í at menna eina mannagongd at meta um brislinganøgd á føroyska landgrunninum.

**Reiðskapur:** Yngultrol við yngullemmum. Marport útgerð at máta reiðskapin og Marport troleygað.

**Um túrin:** Ekkóloddið varð kalibrerað hósmorgun 25. mars. Farið var av Havnini leygardagin 28. mars á middegi. Fyrsta dagin bleiv Tangafjørður kannaður við ekkóloddi, og trolað varð eina ferð. Har var sera trupult at sigla, og enn verri at trola, av tí at hummararúsur stóðu mest sum í øllum fjørðinum. Annan dagin fóru vit inn á Skálafjørð at leita eftir brislingi, har gekk betur at trola, av tí at færri rúsur stóðu har. Sjóvarhitin var gott 5 stig (5,1-5,9).

**Fyribils úrslit:**
Vit hava fingið staðfest at brislingur er inni á føroysku firðunum tíðliga um várið. Sí mynd 1, ið vísir ekkóskriftina, sum var mett at vera brislingur. Vit hava eisini fingið staðfest at gýtingin er byrjað nú í mars. Áður hava vit ikki fingið búnan ella gýtandi brisling, og hava tískil ikki við vissu vitað, nær gýtingin er. Grundin til, at sagt verður at gýtingin er byrjað nú, er, at brislingur gýtir í fleiri umførum yvir eitt avmarkað tíðarskeið. Á donskum verður hetta rópt "portions-gyder".

Brislingurin stóð í smáum torvum nær botni um dagin og lyfti seg frá botni í skýmingini og loystist heilt upp í allari vatnsúluni um náttina.

Nakað av skrift var at síggja á Tangafirði, serliga niður móti botni. Eitt hál varð gjørt í Tangafirði, men trupult var at stýra millum boyurnar og hummararúsurnar; av hesum var ikki møguligt at trola út móti skýming, og tískil slapst ikki niður móti skriftini. Á Skálafjørðinum var eitt sindur av skrift – serliga við botn í djúpasta økinum, og har vóru munandi færri hummararúsur, og tí lá betur fyri at tóva har. Vit gjørdu trý hál har. Eitt hál niðri við botn um dagin, har brislingur var í, eitt hál á 20 m dýpi, har nógv lodnuyngul var í, og eitt hál nær botni í skýmingini, har brislingur var í umframt ein kurv av toski og hýsu.

Longdarbýtið av brislinginum sæst á Mynd 2. Tað eru tveir støddarbólkar, ein á umleið 6 cm og ein størri umleið 10 cm. Tann smærri brislingurin er 1 ár og tann størri er 2 ár. Tann størri fiskurin var búgvin og fleiri vóru rennandi, ella gýtandi (Mynd 3).

Sum nakað heilt serligt, fingu vit lodnu í trolið, bæði á Tangafirði og Skálafirði. Hetta hava vit ikki sæð fyrr. Bæði miðalstór lodna um 10-11 cm og heilt smá lodnuyngul um 3,5 cm vóru í trolinum (Mynd 4). Vit gita, at hetta er lodna, ið er rikin henda vegin úr Íslandi. Ætlandi verður hetta kannað við ílegukanningum komandi tíðina.

**Prøvatøka:** Á túrinum vóru 4 tóv tilsamans. Trolsýnini vórðu tikin fyri at greina sundur ekkóskriftina undir kanningunum og fyri at kanna støddarbýtið av fiskinum.

Havstovan
hin 7. apríl 2020

Jan Arge Jacobsen og Eydna í Homrum




**Mynd 1**. Kanningarøkið hjá Magnusi Heinasyni á brislingakanningum í mars 2020. Ekkóskriftin, sum var mett at vera brislingur, er víst við violettum bollum. Tilsamans vóru 4 trolstøðir tiknar.




**Mynd 2**. Longdarbýti av brislingi í mars 2020. Tveir toppar síggjast, toppurin um 6 cm er 1 ára gamal og toppurin um 10 cm er 2 ára gamal brislingur.



**Mynd 3.** Brislingur um 10-11 cm, ið var búgvin. Tríggir kvennfiskar ovast og tríggir kallfiskar niðast.



**Mynd 4.** Lodna á Skálafirði. Ovast er ein 11 cm búgvin kvennfiskur, og undir eru nøkur lodnuyngul um 4-5 cm.